ítróttur

Nr. 233 • mikudagur • 4. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB og NSÍ verjuleys

**Báðar tær bestu verjurnar í landskappingini í ár eru mestsum avfólkaðar, nú liðini so smátt eru farin at fyrireika seg til komandi kappingarárið í fótbólti**



FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Ein stór orsøk til, at HB og NSÍ gjørdust tey bæði feløgini, ið fingu bestu úrslitini í fótbóltskappingini í ár, var støðugt verjuspæl.

HB, sum vann landskappingina og fekk silvur í steypakappingini, læt bara 19 mál fara ígjøgnum í teimum 18 landskappingardystunum. Og hjá NSÍ, sum við steypasigrinum og silvuri í landskappingini fekk sítt besta úrslit nakrantíð, fóru bara 21 mál ígjøgnum í landskappingini.

Men nú tveir mánaðir eru farnir, síðani landskappingin 2002 endaði, og feløgini so smátt eru farin undir lættari venjingar og fyrireikingar til komandi ár, stendur púra greitt, at hvørki HB ella NSÍ fara at hava somu verjur at dúva uppá, sum kanska bjargaðu feløgunum týdningarmestu úrslitini í ár.

HB má komandi ár vera bæði Hans á Lag og Jóhannus Joensen fyriuttan, og tað man kennast sum smeitur.

Hans, sum umframt at verja væl eisini skjeyt ikki færri enn sjey mál, fer niður til Danmarkar, og landsliðsspælarin Jóhannus hevur gjørt av at venda aftur til røturnar. Komandi kappingarár fer hann at spæla við FS Vágum.

## Svárur missur

Steinfinn Mittelstein, stjóri í partafelagnum Havnar Fótbóltur, ásannar at missurin av hesum báðum spælarunum kennist svárur hjá HB:

– At vit missa spælarar úr frægara endanum, er altíð keðiligt, men verri er tað sjálvandi, at ein so stórur partur av vælvirkandi verjuni hjá okkum nú er burturi, sigur hann.

Eitt annað ivamál í verjuni hjá HB er eisini Jan Dam, sum eftir kappingina í ár setti stórt spurnartekin við, um hann fór at spæla 1. deildarfótbólt aftur næsta ár.

– Vit hava fingið at vita frá Jan, at hann verður verandi í felagnum og fer ongan veg. Nú hevur hann so veturin at hugsa um tingini, og eina ferð eftir nýggjár kanska vit fáa at vita frá honum, um hann tekur eitt tørn aftrat, sigur Steinfinn Mittelstein.

– Um tað so ikki verður á fyrsta liði hjá okkum, ivist eg onga løtu í, at vit altíð kunnu heita á hann í einari sperdari støðu. Men avgerðin liggur hjá honum, og heldur hann, at tíðin er komin at gevast, vilja vit sjálvandi eisini takka honum fyri drúgva og trúgva tænastu fyri felagið.

## Allir burturi

Sum sagt, so er støðan júst tann sama hjá NSÍ, sum ongantíð hevur havt eitt betri ár enn í ár. Men komandi ár verður tað í øllum førum við nýggjari verju, at NSÍ skal verja tey góðu úrslitini, felagið fekk hesa ferð.

Poul Thorsteinsson er farin aftur til B36, 35 ára gamli Arnfinn Langgaard hevur eftir fimtan ár á besta NSÍ-liðnum sett skógvarnar á hillina, og eisini sær út til, at Djóni N. Joensen gevst.

– Hetta merkir fyri okkum, at vit í øllum førum mugu hava annað fólk í verjuna, tá hesir tríggir ikki eru til taks meira, sigur Jónsvein Knudsen, talsmaður hjá Leiðslubólkinum hjá NSÍ.

– Ein møguleiki er, at onkrir av hinum spælarunum á liðnum verða umskúlaður at røkja verjuna, og eisini hevur onkur av teimum roynt tað fyrr. Men tað er sjálvandi eitt sindur truplari at fyrireika seg til komandi ár, tá tríggir so góðir spælarar fara burturav í senn.

## Ringt at fáa fólk

Jónsvein Knudsen sigur, at NSÍ hevur hugt seg um í Føroyum, men at tað ikki hevur ligið so væl fyri at fingið fólk til liðið hjá NSÍ. Og tað skilir hann ikki rættiliga:

– Tá vit nú hava havt okkara besta ár nakrantíð við einum gull- og einum silvurmerki, umframt at vit hava í minsta lagi tveir UEFA Cup-dystir at bjóða komandi ár, skilji eg ikki, at áhugin fyri at koma til NSÍ ikki skal vera størri, heldur hann.

– Vit hava góðar umstøður og eitt væl skipað felag, ið hevur fleiri og stórar avbjóðingar í komandi ári, men eftir øllum at døma skal meira til enn so.

Enn eru ikki allar súður syftar hjá steypavinnarunum, og framvegis verður leitað eftir fólki – fyrst og fremst til tey tómu og tøku plássini í verjuni. NSÍ hevur eitt nú onkran følara uttan fyri landoddarnar, og sum skilst, verður millum annað hugt at onkrum spælara úr íslendsku kappingini, uttan at nakað ítøkiligt er komið burturúr enn.

– Tíðin arbeiðir kortini ímóti okkum, so hendir ikki nakað rættiliga skjótt, verður tað innan fyri egnu rekkjurnar hjá okkum, at vit fara at loysa verjutrupulleikan, sigur Jónsvein.

## Kanska úr Danmark

HB er eisini úti um seg, og nú danski venjarin Frank Skytte næstu tvey árini skal hava ábyrgd av HB-liðnum, verður hann kanska beinleiðis lykilin til at loysa verjutroti hjá føroyameistarunum.

– Venjarin hevur samband við nógv fólk og nógvar góðar spælarar niðri, so kanska tað verður ein máti at finna okkum fólk, sigur Steinfinn Mittelstein.

– Vit kundu ynskt okkum at fingið tveir ella tríggjar mans aftrat til hópin, og tá hugsa vit fyrst og fremst um at fáa tveir verjuspælarar.

Jón Rói Jacobsen, sum nú hevur verið í Brøndby og kanska heldur fram har eftir nýggjár, er jú eisini ein manglandi brikkur í spælinum hjá HB. Hann kundi annars verið eitt boð upp á góða loysn í verjuni, hóast hann meginpartin av árinum spældi í HB-álopinum.

– Enn vita vit ikki, hvussu tað verður við honum, men í øllum førum vildi tað bara skapt okkum ein trupulleika í álopinum, um vit skuldu brúkt hann í verjuni, sigur Steinfinn.

– Tí er triði maðurin, vit vilja hava fatur á, helst ein góður framherji, ið kann styrkja um álopið næst ár.



TB-ÍF 0-3 (21-25, 22-25, 21-25):

# ÍF streyk fram um TB

**Hóast munurin ikki var stórur í nøkrum av settunum, vann ÍF tey øll trý, tá toppuppgerð var í Trongisvági sunnudagin. ÍF er nú oddalið við TB í skugganum**



*Toluliga óvæntað vann ÍF oddadystin í Trongisvági, og hava tær við hesum togað seg fram um TB á stigatalvuni*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Tey eru ikki so fá, ið hava væntað, at kappingin um meistaraheitið fyrst og fremst fór at standa millum TB og ÍF, og stigatalvan sigur eisini, at so er, tí nú hava bæði tvey tólv stig.

Sunnudagin møttust júst oddaliðini bæði í ítróttarhøllini í Trongisvági, og har gjørdi ÍF ikki mætari enn at vinna 3-0. Munurin var lítil í hvørjum setti, men ÍF fekk tey altso øll trý.

Hjá ÍF var talan um veruliga uppreisn eftir tapið móti Drátti, meðan TB hesa ferð ikki megnaði at endurtaka ein sigur, eins og gjørt var móti stríðandi Mjølnirliðnum vikuna frammanundan.

Tá TB við bit og slit vann á Mjølnir, knípti tað longu í fyrsta setti at fáa fatur á, og soleiðis var eisini hesa ferð móti ÍF. Heldur betur gekst í hinum báðum settunum, har TB var væl við frá byrjan, men so ikki megnaði at halda fast. Tí fór ÍF avstað við øllum.

ÍF er sostatt higartil einasta liðið, ið hevur vunnið á TB – enntá tvær ferðir – og tað gevur nú oddasessin, tó við sama stigatalið sum TB. Bæði liðini hava tólv stig.

Lítið man framvegis vera at ivast í, at kappingin um meistaraheitið fyrst og fremst fer at standa millum hesi bæði liðini. Men í hølunum á teimum koma Mjølnir og Dráttur, og tá endaspælið fer í gongd við hálveraðum stigum, verður kappingin kanska bara uppaftur meira spennandi.

# Bæði Bárður og Juanna vunnu

**Væl gekst føroysku spælarunum í donskum flogbólti um vikuskiftið. Bárður og Holte halda seg í toppinum og Juanna og Åbyhøj hava nú fingið annað beinið í endaspælið**

FLOGBÓLTSÚTISETAR
*Hilmar Jan Hansen*

Í ár er Bárður B. Mikkelsen aftur veruliga við í toppinum í donskum mansflogbólti, tí umframt at lið hansara, Holte IF, er næstfremst í landskappingini, skulu Bárður og teir eisini um tvær vikur spæla í donsku steypafinaluni móti HIK Ålborg.

Steypafinalan, sum verður spæld í Århus týsdagin 17. desember, er ein endurtøka av finaluni í fjør, tá Holte IF tapti. Í fjør var eisini finalan um meistaraheitið millum hesi bæði liðini, og tá taptu Bárður og teir eisini.

Við øðrum orðum hevur Holte IF nakað at hevna her, og okkurt kundi bent á, at tað kann eydnast eisini. Tá liðini hittust í sínum innanhýsis dysti fyrr í ár, vann Holte IF á útivølli ein tryggan 3-0 sigur.

Nú grundspælið í landskappingini næstan er komið at enda, er Holte IF næstfremst við 12 stigum, og er tað bara tvey stig aftan fyri oddaliðið Marienlyst Odense. Tvey onnur lið, Skovbakken Volley og HIK Ålborg, hava eisini 12 stig. Sunnudagin spældi Holte IF móti Hvidovre VK, sum er eitt av nýggju liðunum í bestu donsku flogbóltsdeildini, og tann dystin vann Holte IF trygt 3-0.

– Vit høvdu tamarhald á dystinum alla tíðina, og fingu vit roynt nøkur ting í okkara álopsspælið, sum eru góð at taka við til steypafinaluna, sigur Bárður.

Leygardagin er tað so enn eina ferð eitt av liðunum niðan fyri »strikuna«, ið er á skránni, Bedsted KFUM. Hetta er síðsti dysturin í grundspælinum, og Bárður er bjartskygdur:

– Av tí at mótstøðuliðið hjá okkum einki stig hevur fingið, verður taktikkurin óivað tann sami, sum hann var móti Hvidovre VK, at vit skulu vinna og royna ymist, vit ætla okkum at brúka í steypafinaluni, sigur hann.

## Upp um »strikuna«

Juanna S. Joensen, sum spælir við Åbyhøj IF Volley, vann um vikuskiftið ein týdningarmiklan sigur, tá tað eydnaðist at vinna 3-0 á Holstebro KFUM.

Við sigrinum fóru tær upp um »strikuna« og upp á tað »magiska« sættaplássið, ið gevur atgongd til endaspælið. Fyri bara fáum vikum síðani vóru Juanna og tær í Åbyhøj IF Volley langt frá kjansinum at koma víðari eftir nýggjár.

– Servurnar hjá okkum riggaðu stak væl frá byrjan, og vit fingu trýst Holstebro KFUM í botn. Vit tóku okkum kanska í so nógv av løttum í øðrum setti, men vunnu kortini samanlagt ein greiðan sigur, sigur hon.

– Sermerkini í dystinum í dag vóru øll tey framúr góðu kantálopini, sum vit høvdu.

Hóast Juanna og tær sostatt eru komnar millum seks tey bestu, er enn bara annar fóturin komin innum. Dysturin um vikuskiftið móti Frederiksberg Volley, sum er tann síðsti í grundspælinum, verður avgerandi fyri, um Åbyhøj heldur plássið ella ikki:

– Tær í Frederiksberg hava sama stigatal sum vit og liggja bara eitt pláss lægri, men vit hava betri settmun enn tær. Kortini er greitt, at tað verður vinnarin av tí dystinum, sum sleppur við í endaspælið, sigur Juanna S. Joensen.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 8 | 6 | - | 2 | 22 | 11 | 11 | 12 |
| 2 TB | 8 | 6 | - | 2 | 20 | 9 | 11 | 12 |
| 3 Mjølnir | 7 | 5 | - | 2 | 18 | 9 | 9 | 10 |
| 4 Dráttur | 7 | 4 | - | 3 | 15 | 16 | -1 | 8 |
| 5 KÍF | 8 | 1 | - | 7 | 6 | 21 | -15 | 2 |
| 6 Fleyr | 8 | 1 | - | 7 | 6 | 21 | -15 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 0 | 18 | 12 |
| 2 Mjølnir | 4 | 3 | - | 1 | 9 | 5 | 4 | 6 |
| 3 Fram | 9 | 3 | - | 6 | 11 | 9 | 2 | 6 |
| 4 SÍ | 5 | 2 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 4 |
| 5 Fleyr | 7 | 0 | - | 7 | 0 | 21 | -21 | 0 |

Sosialurin
www.sosialurin.fo